# Mannagongd, tá ið endaliga samtykt uppskot til løgtingslógir o.a. verða bornar løgmanni at staðfesta

Sambært §§ 2 og 3 í løgtingslóg um alment kunngerðablað skulu allar løgtingslógir og kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur, ið landsstýrið gevur út, verða kunngjørdar í Kunngerðablaðnum, og er kunngering í Kunngerðablaðnum einasti bindandi kunngerðarhátturin av løgtingslógum o.ø.

Sambært § 26 í løgtingslóg um Stýrisskipan Føroya fær løgtingslógaruppskot, ið Løgtingið hevur samtykt, lógargildi, tá ið tað seinast 30 dagar eftir endaligu samtyktina er staðfest av løgmanni og kunngjørt sambært kunngerðarreglum ásettum í løgtingslóg.

Hetta skjal skal tryggja haldgóðar mannagongdir og samskifti millum Løgtingsumsitingina og Løgmansskrivstovuna og í Løgmansskrivstovuni innanhýsis, tá løgtingslógir verða bornar løgmanni at staðfesta og kunngera.

## 1.0. Undirritað frumrit verða borin móttøkuni á Løgmansskrivstovuni

Frumrit, undirritað av løgtingsformanninum, samundirritað av løgtingsskrivaranum og undirritað av løgtingsstjóranum, verða borin móttøkuni á Løgmansskrivstovuni. Móttøkan á Løgmansskrivstovuni boðar teimum, ið varða av Kunngerðablaðnum, frá beinanvegin, tá løgtingslóg er borin móttøkuni og er klár til heintingar.

## 1.1. Nákvæmt talgilt eintak av frumritinum verður sent Løgmansskrivstovuni

Umframt frumritið sendir Løgtingsumsitingin Løgmansskrivstovuni eitt nákvæmt talgilt eintak av frumritinum í word-formati (dagført og góðkent). Word-fílan skal sendast til hesar t-post adr.: info@tinganes.fo, mortanh@tinganes.fo, gudrida@tinganes.fo, jennyt@tinganes.fo, sjr@tinganes.fo.

Ábyrgdarin av Kunngerðablaðnum ger word-skjalið búgvið til staðfestingar og handar løgmanni tað umvegis skrivara løgmans.

## 1.2. Frumritið skal innihalda hesar upplýsingar

Umframt lógartekstin skal frumritið innihalda hesar upplýsingar:

1) Orðið “Frumrit” skal vera stemplað ovast í høgra horni á frumskjalinum.
2) Frumritið skal vera undirritað av løgtingsformanninum og samundirritað av løgtingsskrivaranum við hesi orðing: “Samtykt á Løgtingi hin (dagfesting) við (atkvøðu- býti) atkvøðum.”
3) Frumritið skal vera undirritað av løgtingsstjóranum ella tí, ið virkar í løgtingsstjórans stað, við hesi orðing: “Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.”
4) Nummarið á løgtingsmálinum “LM (nr.)/(árstal)” skal standa niðast í vinstra horni á frumskjalinum.

### 1.3. Tíðarfreist

Løgtingslógir, sum eru samtyktar á Løgtingi, skulu sbrt. § 44 í Tingskipanini verða Løgmansskrivstovuni í hendi áðrenn 12 yrkadagar eftir tað, at løgtingslógaruppskotið er endaliga samtykt.

### 1.4. Serlig ynski um skjóta staðfesting og kunngering

Um serlig ynski eru um skjóta staðfesting og kunngering, verður hetta fráboðað Løgmansskrivstovuni umvegis telduposti til somu t-post adr., ið eru nevndar í nr. 1.1.

### 1.5. Fráboðan um ósamsvar, villur o.tíl.

Tá ið varnast verður, at undirritað frumskjøl, ið eru send Løgmansskrivstovuni til staðfestingar, ikki eru í samsvari við tað, ið er samtykt á tingi, er mannagongdin henda:

Løgtingsstjórin ella tann, ið virkar í stjórans stað, boðar ábyrgdaranum á Kunngerðablaðnum frá hesum skjótast gjørligt umvegis telefon og sendur eisini eina fráboðan hesum viðv. umvegis embætisgivnu t-post adr. síni til t-post adressurnar, ið eru nevndar í nr. 1.1.

Um Løgmansskrivstovan varnast, at undirritað frumskjøl ikki eru í samsvari við tað, ið er samtykt á tingi, er mannagongdin henda:

Ábyrgdarin á Kunngerðablaðnum ella tann, ið virkar í ábyrgdarans stað, boðar Løgtingsumsitingini frá hesum á t-post adr.: logting@logting.fo og johnhardk@logting.fo

Undirritað frumskjøl verða rættað á henda hátt:

Er talan um einstaka ella einstakar villur í frumskjalinum, verður rætting gjørd í sjálvt frumskjalið við átekning (rætting og dagfesting) frá løgtingsstjóranum ella tí, ið virkar í hansara stað. Løgtingsumsitingin skal hava avrit av rættaða frumskjali.

Er talan um umfatandi ósamsvar millum frumritið og tað, sum er samtykt á tingi, verður nýtt frumrit gjørt og frumritið við villunum afturkallað. Hetta verður gjørt skriftliga av løgtingsstjóranum ella tí, ið virkar í hansara stað, umvegis embætisgivnu t-post adr. síni til t-post adr., ið eru nevndar í nr. 1.1. Løgtingsstjórin kunnar løgtingsformannin um hetta.

### 1.6. Kunngjørdar løgtingslógir kunnu ikki takast aftur

Kunngjørdar løgtingslógir kunnu ikki takast aftur. Tøkniligar og fyrisitingarligar villur kunnu tó verða rættaðar umvegis kunngering av umprenti. Innihaldsligar villur, ið Løgtingið hevur samtykt, kunnu einast broytast eftir vanligu mannagongdunum, ið eru lýstar í Stýrisskipanarlógini og í Tingskipanini.

## 1.7. Mannagongdir í sambandi við uppskot til ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar

Uppskot til ríkislógartilmæli:
Endaliga samtykt uppskot til ríkislógartilmæli verður borið móttøkuni á Løgmans-skrivstovuni til víðari avgreiðslu eins og endaliga samtykt uppskot til løgtingslógir.

Løgtingsumsitingin sendir Løgmansskrivstovuni talgilt eintak av samtyktum ríkislógar-tilmæli í word-formati. Word-fílan skal sendast til somu t-post adr, ið eru nevndar í nr. 1.1.

Gjørt verður tó vart við, at tá Løgtingsumsitingin móttekur hjáløgd skjøl til ríkislógartil-mæli í pdf-formati, verða hesi ikki send Løgmansskrivstovuni í talgildum formi.

Víst verður annars til ásetingarnar í nr. 1.2 og 1.5.

Tá ið løgmaður hevur staðfest ríkislógartilmæli, verður tað sent ríkisumboðnum, sum skrivliga kvittar fyri móttøkuni. Ríkislógatilmælið saman við kvittanríkisumboðsins fyri móttøku verður lagt á heimasíðu Løgmansskrivstovunnar.

Uppskot til samtyktar:
Tá Løgtingið samtykkir uppskot til samtyktar, verður samtykta uppskotið borið mót-tøkuni á Løgmansskrivstovuni, sum sendir samtyktina víðari til avvarðandi stjórnarráð.

## 1.8. Bráðfeingis boð

Um tørvur er at senda bráðfeingis boð uttan fyri vanliga arbeiðstíð viðv. staðfesting ella kunngering, skal ringjast til ein av niðanfyristandandi.

*Løgmansskrivstovan – ring sum raðfest niðanfyri:*

Mortan Hentze, lógasavnsmennari, tlf. 55 80 71
Guðrið D. Andreasen, skrivstovufulltrúi, tlf. 55 80 93
Nella Festirstein, deildarstjóri, tlf. 55 80 76

*Løgtingsumsitingin – ring sum raðfest niðanfyri:*

Jóhanna Arge, løgfrøðingur, tlf. 22 95 39

Anna Rein, løgfrøðingur, tlf. 21 50 55

Johnhard Klettheyggj, stjóri, tlf. 52 02 94

| | |
|---|---|
| Løgmansskrivstovan, 22. juni 2021 | Løgtingsumsitingin, 23. juni 2021 |
| **Marjun Hanussardóttir (sign.)** | **Johnhard Klettheyggj (sign.)** |
| løgmansstjóri | løgtingsstjóri |